# Føroyahúsið vitjan av dansifólki og kóri




**Hetta vikuskiftið stongir kaffistovan í Føroyahúsinum fram til ólavsøku. Men eini tvey góð tiltøk eru eftir enn í juli.**

FØROYAHÚSIÐ
*Tíðindaskriv*

Sláið Ring fer niður til Næstved á dansistevnu við uml. hálvthundrað fólkum. Sunnukvøldið 6. juli vera tey í Føroyahúsinum á Vesturbrúgv í Keypmannahavn og fara upp á gólv saman við teimum, sum støkka inn hetta kvøldið.

Dyrnar lata upp longu kl. 17 og frá kl. 18 verður høvi at keypa sær ein góðan sunnudagsdøgverða við tveimum rættum og kaffi, sum kokkur okkara Stina Gudmundsdóttir stendur fyri. Eftir kl. 20 verður farið upp á gólv og dansað út móti midnátt. Øll eru væl komin og ókeypis er at koma innar.

Á Keypmannahavnarleiðini eru eini trý feløg, sum lívga føroyska dansinum: Fótatraðk, har yngri fólk eru uppií og so Ballerupfelagið og Hvidovrefelagið. Helst vera fólk frá hesum feløgum eisini uppi í dansinum sunnukvøldið, hóast summar og ferðingartíð er.

### Tvey føroysk kór í Keypmannahavn 11. – 12. juli.

Kristiliga Sangkórið vitjar bæði í Oslo, Malmø og Roskilde dómkirkju. Tey telja um 35 fólk og Hanus Joensen skúlastjóri er nú dirigentur í hesum væl kenda kóri.

Kórið fer at hava konsert í Føroyahúsinum fríggjadagin 11. juli kl. 20. Kaffistovan letur upp kl. 19.30. Konsertin er í tveimum pørtum. Í steðginum fer Heri Joensen prestur í Havn , sum eisini syngur við í kórinum, at siga nøkur orð. Eftir konsertina verður høvi at sita eina løtu og lýða á tónleik. Føroyahúsið bjóðar kaffimunn við køkubita. Atgongumerkið er hetta kvøldið 30 kr. inkl. kaffimunnin.

Dagin eftir leygardagin 12. juli verður Vestmannakirkjukór í býnum og syngja í Samuelskirkjuni í Thorsgade kl. 16. Tey koma tá aftur úr Álandi, har tey hava verið nakrar dagar. Kórið telur uml. hálvthundrað fólk, har nógv av teimum er ungfólk. Erla Olsen er dirigentur í hesum kórið.

### Ólavsøkan í hondum

Ólavsøka skal vera í Føroyahúsinum, men tvørleikin er at so mong av teimum, sum á ein ella annan hátt eru tøk um veturin, eru á ferð um ólavsøkuna. Kortini eydnast hvørt ár at fáa eini tveir hugnarligar dagar burturúr. Rættiliga fitt av heimafólki kunna vera niðri um ólavsøkuna og støkka inn á gólvið.

Sunnudagin 27. juli byrja vit við fernisering. Hesu ferð eigur Niels Salmony úr Trongisvági ólavsøkuframsýningina. Niels hevur búð niðri í mong, mong ár og hevur arbeitt innan teldutøkni, men í frítíðini eru áhugamálini sigling, Neystið í Ishøj og so at mála. Men Niels verður ikki einsamallur hesu ferð. Saman við honum fer vinmaður hansara norðmaðurin Bjørn Lerberg at hava framsýning við glasi og keramikki sum raku og pitfire. Hansara tema eru fuglur, fjøll og fiskur. Bjørn er útbúgvin innan listsøgu. Hendan dagin bjóðar húsið, sum skipar fyri, sneisabitar o. A. Eisini verður tónleikur.

Ólavsøkuaftan verður opið seinnapartin og út til kl. 01. Vit lýða á frásøgnina um kappróðurin í Havn. Húsið hevur nú ADLS-samband, sum riggar væl í kaffistovuni til slíkar sendingar. Kl. 18 verður ólavsøkan sett og um hetta mundi verður eisini matsøla av ymsum slag. Eftir kl. 20 fara Ian Onghamar og Lítli Jóhan at spæla saman. Hetta verður eitt blandað kafé- og dansikvøld, so høvi verður bæði at tríva í onkran lættan sang saman við teimum, at lýða á teirra framførslu og at fáa eina løtu á dansigólvinum.

Ólavsøkudagur er altíð stillisligari. Kaffistovan er opin seinnapartin og út móti midnátt. Ólavsøkugudstænastan verður sum vanligt í Eliaskirkjuni kl. 17 og eftir tað er matsøla í Føroyahúsinum og síðani hugnakvøld við felagssangi, "midnáttarøðu" og tónleiki.

- Eftir ætlan skipar Føroyahúsið fyri ólavsøkutiltakinum úti á Bryggjuni næsta summar. Tá skal meira gerast burturúr sjálvandi, men lat okkum síggja hvussu leikur ferð.

### Heystið fyri durunum

Kaffistovan verður stongd nakrar dagar eftir ólavsøkuna. So ætlar tú inn á gólvið í summar, liggur best fyri á ólavsøku 27. – 29. juli ella eftir 10. august, tá ið alt fer í gongd aftur. Nýggj fólk taka við, tí ein er farin í barsil, ein heim til Føroya og ein í annað starv. Fyrsti týsdagsdøgverðin í heyst verður 20. august. Teir eru so hvønn týsdag til aftur síðst í mei. Vanliga verður bert borðreitt við føroyskum døgverðamati. Næsta ferniseringin verður 31. august við havnarkonuni Fanny Karbæk Mouritsen og amerikumanninum Henry Fr. Meils-Meiseles.

Fyrsta dansikvøldið í heyst verður 6. septembur, tá ið Fótatraðk skipar fyri. Hetta plagar altíð at vera gott kvøld, nú tá ið tey ungu og ferðandi koma niðuraftur. Fleiri ferð hava vit funnið ein dag til reseptiónina, nú stórverkið hjá Marianne Clasuen um føroysku kvæðaløgini skal koma út. Nú er vist heilt vist at hetta verður til ólavsøku heima. Reseptiónin verður í Føroyahúsinum 12. septembur. Hetta og mangt annað verður lýst gjøllari seinni.

Nú er summar og útisetar eru sum flytifuglurin – teir mugu út at ferðast. Mangt steðgar upp á hásumri. Eitt nú Nærvarp Okkara, sum ikki sendir millum 7. juli og 28. august. Sí teirra spennandi heimasíðu narvarp.dk. Føroyska Ráðgevingin hevur bert telefonviðtalu bert telefonviðtalu frá 6. juli til 6. august, sí annars heimasíðu teirra radgevingin.dk. Her kanst tú eisini fáa vegleiðing um mangt og hvat. Og Føroyahúsið hevur eisini heimasíðu, har uml. 60.000 fólk hava verið á í sløk tvey ár. Heimasíðan eitur faroehouse.dk. Umframt tíðindi og skrá her finnur tú eisini ein hóp av slóðum til aðrar heimasíðir.

Føroyahúsið ynskir øllum landsmonnum, viðskiftafólki og útisetum gott summar, verður sagt at enda av Vesturbrúgv.


## Roknskaparfólk til Fíggjardeildina

"Pengar skapa eingi hugskot. Tað eru hugskotini, sum skapa pengar".
W.J. Cameron



**Starvsfólk til Fíggjardeildina**

Í samband við at eitt av okkara starvsfólkum fer úr starvi, verður søkt eftir einum roknskaparfólki til okkara Fíggjardeild at byrja 1. september ella skjótast gjørligt. Nýggja fólkið skal vera við menningini av fíggjarfyrisitingini og –stýringini av fyritøkuni.

Í Fíggjardeildini starvast 5 fólk, harav 2 búskaparfrøðingar. Føroya Tele brúkar Oracle Financials í samband við fíggjarstýringina, herundir Discoverer og TM1 til rapportering og til mánaðarroknskapir. Í samstarvi við hini starvsfólkini á Fíggjardeildini verða uppgávurnar at vera við til at menna og avgreiða niðanfyristandandi:

- ársroknskap og aðrar tíðarroknskapir
- fíggjarætlanir og uppfylging av teimum v.m.
- virkisøkisroknskapir
- viðlíkahald av anleggskartoteki, herundir uppfylging av løgum
- skrivligar mannagongdir v.m.
- ger av ymsum rapportum í Discoverer v.m.
- ymsar ad hoc uppgávur

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Førleikakrøv**

Tann, sum sett/-ur verður, skal hava hollar royndir og førleika innan roknskapararbeiði frá líknandi størvum ella frá grannskoðara. Tað er ein fyrimunur, men ikki eitt krav, at viðkomandi hevur útbúgving sum t.d. HD, HA ella líknandi. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi er fleksibul og hevur:

- kunnleika til fíggjarstýringsskipanir
- góð samstarvsevni
- evni at arbeiða sjálvstøðugt

Lønin verður sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag og samsvarandi førleikum.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, Tel 30 30 30 lokal 3297 ella á fartelefon 24 32 97.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. august 2003.

Umsóknir skulu sendast til:
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Stapið framíðina saman við okkum!







*Sum er ásetir eingin lóg, hvussu teir skrivaðu miðlarnir í Føroyum skulu uppføra seg. Almennu miðlarnir koma undir økið hjá Løgtingsins umboðsmanni. Men journalistikkur hóskar seg illa til umboðsmannin, sum hevur eftirlýst eina ábyrgdarlóg fyri allar fjølmiðlar. Nú kemur hon.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fjølmiðlar fáa ábyrgd

**Loksins er ein lóg ávegis, sum tryggjar borgaran ímoti fjølmiðlunum. Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, hevur sent uppskot um fjølmiðlaábyrgdarlóg til hoyringar. Lógin ásetir, hvør hevur ábyrgdina av tilfarinum, sum verður framleitt í føroyskum fjølmiðlum, og inniheldur eina kærunevnd, sum skal avgera ivamál**

FJØLMIÐLAR
*Ingi Rasmussen*

Føroyingar fáa egna lóg um fjølmiðlaábyrgd tann 1. januar 2004.

Tað ætlar Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum hevur sent uppskot til lógtingslóg um fjølmiðlaábyrgd út til hoyringar.

Ábyrgdin hjá føroyskum fjølmiðlum hevur javnan verið havd á lofti síðstu árini. Løgtingsins umboðsmaður hevur eisini harðliga átalað, at eingin lóg ásetir, hvussu miðlarnir í Føroyum uppføra seg. Fleiri royndir eru gjørdar at fáa eina dagførda lóggávu á økinum, men tær eru allar miseydnaðar higartil.

Nú skuldi borið til. Tann 3. februar 2003 undirskrivaðu danski løgmálaráðharrin, Lene Espersen, og landsstýrismaðurin við lógarmálum eina avtalu um yvirtøku av málsøkinum fjølmiðlaábyrgd til Føroyar.

Tað er á hesa avtalu, at Høgni Hoydal byggir sítt lógaruppskot, sum telur 55 lógargreinar.

### Journalist við ábyrgd

Høvuðsendamálið við lógini er at tryggja skrivi-, talu- og kunningarfrælsi og skapa bestu fortreytirnar fyri almenna orðaskiftinum. Tað skal gerast við at áseta eina ábyrgd fyri tað skrivaða ella varpaða orðið. Nýggja lógin ger, at tað altíð er ein persónur, sum kann ábyrgdast fyri innihaldið í einum fjølmiðli. Frameftir hava navngivnir høvundar, tað eru journalistar og onnur, sjálvir ábyrgdina av tí, sum verður almannakunngjørt. Blaðstjórar ella redaktørar hava hinvegin ábyrgdina av øllum tí, sum verður borið víðari frá ónavngivnum. Tað vil siga, at rættindini hjá fjølmiðlum at verja keldur teirra verða tryggjað. Samstundis verður so staðfest, at blaðstjórin hevur ábyrgdina av ónavngivnum lesarabrøvum.

Blaðstjórin ella redaktørurin verður somuleiðis ábyrgdaður, tá hann áleggur einum journalisti at skriva okkurt ávíst ella er vitandi um, at tað, sum journalisturin skrivar, er ivasamt.

Sostatt ásetir uppskotið til fjølmiðlaábyrgdarlóg, hvørjum eitt rættarmál kann vendast ímóti, um tað kemur til skarpskeringar. Men lógin ásetir onki mark fyri skrivi-, talu- og kunningarfrælsinum, ella hvat kann revsast. Hesar ásetingar vera framvegis at finna í aðrari lóggávu, serliga revsilógini.

### Eitt fjølmiðlaráð

Tað er kortini verri enn so altíð, at eitt rættarmál er loysnin á einari trætu millum borgaran og fjølmiðilin. Sambært lógaruppskotinum skal eitt fjølmiðlaráð setast við fýra limum at taka avgerðir í ivamálum. Ráðið kann eisini av sínum eintingum taka mál upp, tá hon heldur góðan fjølmiðlasið vera brotnan.

Formaðurin, sum skal vera løgfrøðingur, verður útnvendur av Fróðskaparsetrinum. Tíðindafólk velja sær eitt umboð, redaktiónsleiðslurnar velja eitt umboð, og ein borgari verður valdur av nevningalistanum at umboða almenningin.

Fjølmiðlaráðið skal eitt nú gera av, um ein fjølmiðil hevur framt brot á aðalregluna um góðan fjølmiðlasið. Og ráðið skal eisini taka avgerðir í spurningum um rættindini hjá einum borgara ella virki til at svara aftur.

Lógin um fjølmiðlaábyrgd er send til hoyringar hjá øllum fjølmiðlum í Føroyum, Føroya landfúta, Løgtingsins umboðsmanni, Føroya advokatfelagi og feløgunum hjá fjølmiðlafólkum. Ætlandi kemur lógin í gildi 1. januar 2004, sambært uppskotinum.

**Fakta**

**Fjølmiðlaráðið:**
1. Formaðurin, valdur av Fróðskaparsetrinum
2. Eitt umboð fyri fjølmiðlafólk
3. Eitt umboð fyri leiðslurnar á fjølmiðlunum
4. Eitt umboð av tinglistanum

**Fjølmiðlaráðið skal**
- gera av, um ein fjølmiðil hevur framt brot á aðal regluna um góðan fjølmiðlasið, og
- taka avgerð í spurningum um rættindini at svara aftur

## Kanna hassjmálið uttanlands

**Løgreglan kannar, hvørjir persónar standa aftan fyri stóru nøgdina av hassji, sum varð roynd at smugla inn í landið. Kanningarnar ganga fyri seg bæði í Føroyum og uttanlands**

RÚSEVNI
*Ingi Rasmsussen*

Danski maðurin, sum varð tikin við 20 kilo av hassji uppi á sær á veg í land av Norrønu, hevur nú sitið avbyrgdur í tvær vikur. Hann varð varðhaldsfongslaður í fýra vikur tilsamans, og tá næstu tvær vikurnar eru farnar, roknar løgreglan við, at málið er klárt at koyra fyri rættin.

Tað upplýsir Georg Otthamar, kanningarleiðari.

Løgreglan ger framvegis kanningar í málinum, og kannað verður bæði í Føroyum og uttanlands, hvør ætlanin var við stóru nøgdini av hassji.

– Vit kanna, hvaðani maðurin hevur fingið rúsevnini, og hvagar tað skuldi fara, sigur Georg Otthamar, sum ikki fær sagt so nógv, so leingi málið verður kannað.

Líkt er til, at løgreglan hevur fingið um endan á einum nýggjum neti, sum menn royna at etablera á føroyska marknaðinum, nú stóra rúsevnismálið í fjør steðgaði fleiri føroyskum bakmonnum. Tað er í øllum førum greitt, at kanningarnar snúgva seg um at finna aðrar persónar enn tann eina. Spurningurin er eisini, um tað eru »felagsskapir« uttanlands, sum royna at koma inn í landið við rúsevnum.

– Nøgdin er so mikið stór, at talan ikki bara kann vera um ein persón, sigur Georg Otthamar, sum kortini ikki vil siga nakað um, hvørt aðrir persónar eru handtiknir ella avhoyrdir í málinum.

Søluvirðið á hassjinum verður mett til 2,5 milliónir krónur, og tað klárar neyvan ein einsamallur at bera kostnaðin av.